## Labrador dugir væl

Ymisk hundasløg kunnu venjast til at verða førarahundar hjá blindum og sjónveikum. Millum hundasløgini eru schefarin, Golden retriever og ikki minst Labrador retriever. Hundarnir skulu verða millum 10 mánaðir og tvey ár, tá ið teir fara undir sína venjing. Teir skulu góðir við fólk, djór og lutir, og teir skulu verða reinligir og vanir at verða inni. Bæði tíkir og hann'ar kunnu brúkast sum førarahundar. – Mær dámar væl at hava ein labrador. Hann er sera fittur og róligur at hava í húsi. Schefarin hevur verið nógv brúktur, men har kemur tað kanska uppí, at nógv fólk ræðast shefarar, og tí eru tey kanska farin eitt sindur burtur frá at venja schefarar, sigur Uni Rasmussen.



# til Lottu



– Eg hevði gingið fram við hundinum, sum var niðri í gjónni við bakkan hinumegin. Fólk høvdu leitað hinumegin gjónna, men tey høvdu helst ikki sæð niður í gjónna, har hundurin var. Og hevði hundurin ikki givið ljóð frá sær, so hevði eg ikki funnið hann, tí eg var faktiskt farin framvið honum. Kanska hevur hann sæð meg og er so farin at hvína, sigur Petur Joensen.

### Sissaðu Lottu

Hundurin, sum var niðri í gjónni, var førarahundurin Lotta, tað ivaðist Petur Joensen ikki í.

- So ringdi telefonin hjá mær. Tað var Jóan Petur, sum spurdi, hvar eg var, tí onkur hevði sagt við hann, at tey høvdu sæð ein mann renna fram við gjónni. Ja, eg havi kanska verið eitt sindur skakkur, tá eg fann hundin, men eg kom niður á jørðina aftur.

Petur Joensen royndi at nærkast hundinum, men hann vildi ikki koma óneyðuga nær.

- Eg vildi ikki leggja trýst á hundin, tí hann var nakað óróligur. Eg rópti á hann, at nú fór Uni at koma, og tað fekk hann beinanvegin at slappa av. Jóan Petur gekk fram á hundinum har niðri frá, og vit vóru rundan um hann, men lótu hann fáa frið, so hann ikki gjørdi nakað óneyðugt.

- Hundurin var róligur, og hann tóktist verða væl fyri, hóast hann hevði verið í haganum í tveir dagar.

### Heima aftur

Uni Rasmussen var í Norðragøtu, meðan tann skipaða leitingin fór fram leygardagin. Har sat hann hjá samskiparanum og bíðaði sum hundur bíðar eftir beini – tolin og spentur.

- Fyrst komu boðini um, at onkur hevði sæð ein hund í Gøtugjógv, og tað vóru góð boð at fáa. Og so komu boðini um, at tað var hundurin hjá mær, og tá var gleðin stór, sigur Uni Rasmussen.

Tyrlan fleyg Una Rasmussen niðan í gjónna, har hundurin var funnin. Eigarin skuldi tryggja, at hundurin kom upp úr gjónni aftur í øllum góðum.

– Eg gekk so út á eggina og royndi at rópa á Lottu, so hon vildi sleppa upp úr gjónni. Tað stuttliga var, at Jóan Petur, sum var annar av teimum í gjónni, hevði eina reim við sær – tað vóru ikki nógv sum høvdu reim við at leita, men tað hevði hann.

Lotta kom úr gjónni í øllum góðum, og tyrlan fleyg Una Rasmussen og hundin hjá honum oman í Norðragøtu. Uni fór beina leið heim at geva hundinum at eta og drekka.

– Lotta var yvirraskandi væl fyri, men hon var sera tyst og svang. Tá hon hevði fingið at eta, gingu vit oman á keiina, har fólk møttu, og tá var eingin trupulleiki hjá Lottu at fara avstað. Hon var beinanvegin klár at fara, so hon var bara heilt væl fyri. Seinni á degnum merkti eg væl á henni, at hon var troytt og hevði góðan hug at liggja, sigur Uni Rasmussen.

### Tann góði endin

Sunnukvøldið hittu vit Petur Joensen og Una Rasmussen heima hjá Una í Norðragøtu, og tað var einki at fjala útyvir, at menninir báðir vóru sera fegnir um, at tað spældi so væl av.

– Eg búgvi her í grannalagnum, so eg síggja ofta Una, tá ið hann fer avstað við hundinum, og eg havi mangan hugsað um, hvussu væl teir klára seg, sigur Petur Joensen.

– At missa hundin var sum at missa sjónina einaferð aftur, tí hundurin hjálpir mær so ótrúliga væl í gerandisdegnum, sigur Uni Rasmussen.

Og Lotta sjálv ger lítið hóvasták burturúr. Ætlanin hjá henni var neyvan at spæla hund, tá ið hon rýmdi á nýggjárinum. Hon er rólig og vinarlig, og hon smæðist ikki, tá ið fremmandir gestir koma á gátt. Tá ið vit so skulu taka myndir, setir Lotta seg sum ein sonn stjørna millum eigaran Una og finnaran Petur.

Og soleiðis fáa summar søgur ein góðan enda.

# Ovfarin av hjálpini

**– Eg veit sjálvur, hvussu stóran týdning hundurin hevur fyri meg, men tað kom óvart á meg, at fólk eisini vistu tað, sigur Uni Rasmussen**

BURTURBLIVIN

*Eyðun Klakstein*

*eydun@sosialurin.fo*

**Tað stóð einki til hjá Una Rasmussen, tá ið førarahundur hansara rýmdi úr Norðragøtu nýggjársdag. Hundurin varð kløkkur av onkrum fýrverksbresti og fór til stroks.**

**Uni Rasmussen byrjaði sjálvur leitingina eftir hundinum hjá sær nýggjársdag. Hann gekk runt í Norðragøtu og floytaði og rópti eftir hundinum, men har var eingin hundur at finna.**

**Síðani komu alt fleiri fólk upp í leitingina, og leygardagin teknaðu eini 150 fólk seg til skipaðu leitingina umframt at onnur eisini leitaðu.**

**- Eg veit sjálvur, hvussu stóran týdning hundurin hevur fyri meg, men tað kom óvart á meg, at fólk eisini vistu tað, og at so mong vildu hjálpa til at leita. Eg eri sera takksamur og glaður fyri alla hjálp, sum eg havi fingið, sigur Uni Rasmussen.**

**Og ikki minst kann hann fegnast um, at hundurin varð funnin aftur í øllum góðum.**



*Uni Rasmussen er sera fegin um, at so mong hjálptu honum at leita eftir hundinum*

*Mynd: Árant Hansen*